# Sløkkja fyri DR

**Í næstum fer Canal Digital at gevast við at senda DR ókeypis. Ynskir tú ikki at gjalda 2.064 kr. fyri DR1 og DR2 um árið, so er einki at gera. Nógvir føroyingar hava longu gjørt av at gjalda fyri almennu donsku rásirnar**

FYLGISSVEINA-SJÓNVARP
*Heri á Rógvi*
*Áki Bertholdsen*



*Í næstum verður tað ikki eitt tekniskt brek, sum forðar føroyingum at síggja donsku sjónvarpsrásirnar DR1 og DR2*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Canal Digital sendi fyri kortum sínum føroysku kundum eitt bræv, har boðað varð frá, at Canal Digital ikki longur fer at senda DR1 og DR2, t.e. Danmarks Radio, ókeypis til føroyingar.

Tað er nú liðugt við hesum, og nú skulu føroyskir kundar hjá Canal Digital gjalda 2.064 kr. um árið - 172 kr. um mánaðin – fyri at síggja DR1 og DR2 talgilt hjá Canal Digital.

Eftir røttum skuldi hetta koma at virka frá 1. oktober at rokna, men orsakað av teimum teknisku broytingunum gongur ein tíð, áðrenn skíggin verður svartur, tá TV Avisen er á skránni.

Peter F. From frá Canal Digital sigur, at teir hava merkt ein stóran áhuga úr Føroyum fyri teirra nýggja produktið – DR International. Produktið er DR1 og DR2, t.e. júst tað sama sum áðrenn, men nú skal gjaldast fyri rásirnar. Áhugin fyri DR International er størri enn teir høvdu roknað, sigur Peter From. Hann dugir ikki enn at siga, hvussu stórur áhugin er, tí skipanin er ikki komin at virka enn. Av somu orsøk er heldur ikki sløkt enn fyri DR1 og DR2 hjá Canal Digital. Peter From vil ikki siga, hvussu nógvar kundar Canal Digital hevur í Føroyum, uttan tað, at talan er um nógvar kundar í mun til fólkatalið. Greitt er, at áhugin fyri Canal Digital er sera stórur í Føroyum. Handlar, ið selja Canal Digital í Føroyum, upplýsa fyri Sosialinum, at talið mestur liggur um nøkur túsund, men tað er rættiliga torført at koma við nøkrum greiðum tali.

Peter From sigur, at teir royndu at fáa DR at minka prísin, men hetta eydnaðist ikki. Prísurin, ið føroyingar skulu gjalda, skal vera á leið tað sama sum danir gjalda í licens fyri at síggja DR. Tískil heldur Peter From, at prísurin er tað, ein kundi roknað við.

Samanlagt hevur Canal Digital 1,2 mió. kundar í Norðanlondum. Sent verður í øllum teimum skandinavisku londunum. Tað er norska Telenor, ið eigur Canal Digital. Samlaði umsetningurin liggur um 1,2 mia. um árið. Canal Digital vóru teir fyrstu, sum fóru undir at senda talgilt, t.e. digitalt, í Norðanlondum. Hetta gevur munandi betri góðsku enn analog, og harumframt fæst meira burturúr hvørjum signali sær.

## Bíligt hjá SvF

Tað eru tó ikki øll, sum noyðast so langt niður í lumman fyri at síggja DR. Almennu rásirnir hjá Danmarks Radio í syðra enda av ríkinum loyva nevniliga Sjónvarp Føroya at senda alt teimum lystir av teirra sendingum.

Mikkjal Helsmdal, stjóri fyri Sjónvarp Føroya, sigur, at SvF í fjør sendi, í rundum tølum, 2.700 tímar í alt, t.e. 7,4 tímar um dagin í miðal. Av hesum vóru 65% ella 1.755 tímar sendingar frá DR. Nevnast kann, at sendingar frá TV2 eru 15% av senditíðini hjá Sjónvarpi Føroya, og føroyskar sendingar við endursendingum av hesum eru 20 % ella umleið 540 tímar.

Tað vil so siga, at fyri tínar 1.500 kr. í hyggjaragjaldi árliga fært tú, umframt føroyskar sendingar og sendingar frá TV2, 1.755 tímar við sendingum frá DR árliga.

Mikkjal Helmsdal upplýsir, at teir í roynd og veru gjalda eina fasta upphædd fyri tær sendingar, ið teir senda frá DR.

Danmarks Radio keypir rættindi til sendingar av ymsum slag, og teir gjalda tá fyri rættindini fyri alt kongaríkið. Kostnaðurin hjá Sjónvarpi Føroya fyri at senda teir 1.755 tímarnar er 300.000 kr. Hetta svarar til 1,2% av samlaðu útreiðslunum hjá SvF, og sum heild sleppur SvF við bert at gjalda tann avgreiðslukostnað, ið DR hevur av fáa sendingarnar til Føroya.

Fyri sendingar frá TV2 skal SvF gjalda 1.200 kr. fyri hvønn tíma.

– Tú kanst siga, at tað er DR, sum fyri ein sera stóran part fyllir sendiflatuna hjá okkum. Øll fíggjarlig orka fer til at framleiða føroyskar sendingar, sigur Mikkjal Helmsdal, tá spurt verður, um tað ikki er DR, sum stendur fyri fíggingini av Sjónvarpi Føroya.

Tað er eisini Sjónvarp Føroya, ið eigur rættindini til Danmarks Radio í Føroyum. Tað skulu so geva loyvi til Canal Digital, Televarpið ella onkran annan, um hesin ynskir at senda DR í Føroyum.

Higartil hevur Sjónvarp Føroya givið loyvið til hetta, heldur enn at seta seg upp ímóti.

Givið er, at hendan nýggja støðan, har føroyingar skulu gjalda 2.000 árliga fyri Danmarks Radio, ger tað eitt sindur meira forkunnugt at síggjar endurvarpaðu sendingar hjá SvF.

## Við hjá Televarpinum

Tróndur Djurhuus stjóri fyri Televarpið, fyritøkan hjá Føroya Tele, ið seinni í ár ætlar at fara undir at endurvarpa útlendskar fylgissveinarásir, sigur, at teir miðja ímóti at hava DR1 og DR2 við í teirra programmpakka. í løtuni samráðast teir við Danmarks Radio um prísin.

Peter From sigur, at teir hava fingið greitt at vita frá DR, at eingin sleppur at senda DR uttanfyri Danmark fyri minni enn tað, ið Canal Digital sendir DR fyri.Við øðrum orðum vil Peter From vera við, at føroyingar skulu av við umleið 2.000 kr. árliga fyri at síggja DR.

Televarpið skal eftir ætlan byrja at senda í ár, men nær tað verður er framvegis ógreitt, tí samráðingar enn fara fram við teir ymsu veitararnar. Tróndur Djurhuus hevur áður sagt við Sosialinum, at ein partur av rásunum eru komnar undir land. Talan verður væntandi um fleiri sokallaðar programmpakkar.


*Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri, sigur, at teir senda umleið 1.755 tímar árliga frá Danmarks Radio*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



# EL-IN 10 ár

**Fríggjadagin heldur handilin EL-IN 10 ára føðingardag. Tann 19. september vóru tað tíggju ár, síðani eigarin Hilmar Danielsen og konan, Elin, lótu dyrnar á handlinum upp fyri fyrstu ferð. Nógv er broytt seinastu tíggju árini**

FØÐINGARDAGUR
*Solby A. Eliasen*


*El-handilin EL-IN heldur tíggju ára føðingardag fríggjadagin. Tað er Hilmar Danielsen, sum eigur og rekur handilin*

**Klaksvík:** Hilmar sigur, at tað var sera hart at byrja, serliga tá hugsað verður um tíðina, sum tey valdu at lata upp.

- Eg las niðri og plagdi at koma heim at arbeiða í summarfrítíðum, og tað vardi ikki meg, at tað fór at ganga so illa, tí tá var altíð nóg mikið at gera. Eisini tað, at vit búðu niðri, gjørdi, at ein merkti ikki niðurgongdina, greiðir hann frá.

Hann fyrireikaði sína ætlan um at lata handil og el-verkstað upp, meðan hann var staddur í Danmark. Og hóast tað ikki sá so ljóst út, tá hann flutti heim, so helt hann á.

- Ongin droymdi um, at tað fór at verða so ringt, sigur Hilmar og sipar til, at ikki meira enn tríggjar vikur eftir, at hann lat handilin upp, tá fór bankin á heysin.

Tað minnist hann, sum tað var í gjár. Tí hann sigur, at tað sást ikki fólk úti í einar fjúrtan dagar, inntil tað ringasta av skelkinum hevði lagt seg. So byrjaðu fólk at koma útaftur, men so reyk hin bankin eisini, og so var aftur heilt galið.

- So tað var avbera torført at byrja tá.

Og tríggjar mánaðar seinni, til nýggjárið, kom so MVG lógin, og tað lætti ikki um hjá Hilmari og konuni. Tey bæði arbeiddu í fyritøkuni, og so høvdu tey ein at hjálpa til, um á stóð.

- Men hann fekk ikki nógvar tímar her ta fyrstu tíðina, tað er púra vist, sigur Hilmar og samanber umsetningin tá og nú.

- Umsetningurin tann januar mánaðan, tað má so hava verið í 1993, var tað sama, sum vit hava upp á ein dag í dag. Tað ber næstan ikki til at hugsa sær í dag, sigur Hilmar.

## Bygt spakuliga upp

Tá var hølið, sum EL-IN húsast í eisini munandi minni.

Eitt bakarí var eisini á somu hædd sum handilin, so tey høvdu bert tað eina hølið til kontór, verkstað og goymslu. Og so var handilin afturat.

Men so lat bakaríið aftur, og Hilmar hevur so spakuliga bygt upp gjøgnum tíðina. Hann byrjaði við 100 fermetrum og í dag ræður hann yvir 350 fermetrum og so hevur hann flutt verkstaðin út. Í dag leiga tey gamla verkstaðin hjá Pomek til teirra verkstað.

Og Hilmar sigur, at 350 fermetrar hevur eisini víst seg at vera ov lítið.

Tey hava úr at gera hjá EL-IN, men Hilmar sigur tó, at tað eru sera skiftandi tíðir, kortini.

- Tað er sera ójavnt, men tá tað er nógv at gera, so er tað eisini sera nógv. So kunnu tað koma einar tvær vikur, har tað ikki er so nógv og so umaftur.

Hilmar sigur, at tað sær út til at fara at standa í stað hjá teimum komandi ár, men tað er so eisini fyrstu ferð. Fyritøkan er vaksin spakuliga upp gjøgnum árini til tað, hon er í dag.

EL-IN selur lampur, hvítvørur og el-lutir. Og so hava tey verkstaðin afturat.

Tað arbeiða 10 fólk hjá EL-IN í dag, sum nú heldur sín 10 ára dag.

Fíggjarætlan hjá Klaksvíkar Kommunu samtykt:

# 4,7 milliónir í yvirskoti

**Klaksvíkar býráð samtykti týskvøldið einmælt fíggjarætlanina fyri 2003**

BÝRÁÐSFUNDUR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Tað var eitt einmælt býráð í Klaksvík, sum týskvøldið samtykti fíggjarlógina fyri 2003, sum vísir eitt yvirskot upp á 4,7 milliónir krónur.

Býráðsfundurin varð settur kl seks týskvøldið, og allir limir vóru møttir. Ein av limunum søkti um farloyvi, og tók Hergerð Joensen, næstvaldi limur sæti fyri viðkomandi.

Steinbjørn Jacobsen setti fundin og tað gekk sera skjótt at fáa tey fyrstu málini í gjøgnum og samtykt. Tvey mál vórðu tikin av skránni, tí at borgarstjórin segði seg hava fingið upplýsningar um hesi mál, sum vendu málinum, og tí tók hann tey av aftur skránni.

So kom fíggjarætlanin fyri 2003 fyri.

Eyðgunn Samuelsen var fyrsti røðari og hon segði, at eitt sum eyðkendi hesa fíggjaætlanina var, at hon er verulig. Her vísti hon á, at tað verður roknað við inntøkum upp á 110 milliónir komandi ár, og tað verður roknað við einum yvirskoti upp á 4,7 milliónir.

Hetta fegnaðist formaðurin í sosialu nevnd sjálvsagt um, og hon segði eisini speiskliga:

- Ikki fyri at reypa, men hetta yvirskotið er also dupult so stórt sum tað hjá landinum, so tað má metast at vera avbera gott.

Eisini tosaði hon um, at sitandi býráð metir tað vera av alstórum týdningi at rinda skuldina hjá kommununi, sum komandi ár væntandi kemur niður um eina álíkning, niður sum skjótast, so teir pengarnir kunnu nýtast til onnur átroðkandi mál.

Klaksvíkar Kommuna rindar komandi ár 2 milliónir meira niður av skuldini, enn teimum er álagt, og tað heldur Eyðgunn avspeglar hugburðin hjá samgonguni til at fáa skuldina burtur so skjótt sum til ber.

## Søgulig fíggjarætlan

Karl Heri Joensen kom millum annað inn á, at henda fíggjarætlanin er søgulig, tí tað er fyrstu ferð at roknað verður við inntøkum omanfyri tær 100 milliónirnar. Hann segði, at tað var ein øking farin fram í rakstrinum upp á 5,7 milliónir, men vísti so samstundis á, at av hesi øking eiga IRF og barnaansingin 70%.

- Hetta slær fast, at tað er ikki raksturin, sum hevur galoperað avstað uttan eftirlit, segði Karl Heri Joensen.

Hann mælti býráðnum at taka einmælt undir við fíggjarætlanini fyri 2003.

Hilmar Danielsen eftirlýsti ein skattalætta. Hann helt, at borgarin í Klaksvík hevði uppiborið at sloppið at feira, at kommunuskuldin nú væntandi fer at koma niður um eina álíkning við einum skattalætta.

Rani Nolsøe tosaði millum annað um havnaøkið í Klaksvík. Formaðurin í Havnanevndini segði, at kaiøkið er í sera ringum standi, tí tað er niðurslitið.

Allir limir tóku undir við fíggjarætlanini, og eitt minnilutauppskot frá Jógvani við Keldu bleiv ikki samtykt. Í hesum uppskotinum var millum annað, at 2 milliónir skuldu flytast frá avdráttum av lánum til tónlista og mentanardepil í miðbýnum. Eisini skjeyt hann upp, at 200.000 krónur skuldu flytast frá Ósáin Rein til fyrireiking at eini mentanarpark. Men hetta uppskotið fall sum sagt.

Allir limir fegnaðust tey um, at tað nú aftur sær so gott út hjá Klaksvíkar Kommunu, og vóru á einum máli um, at tað var ábyrgdarfult og positivt at raðfesta afturrindan av skuld høgt. Men eisini var greitt, at tað eru mong mál, sum liggja á láni. Til dømis báðir fólkaskúlarnir og havnaøkið, sum treingja til umfatandi umvælingar ella útbyggingar, um tey skulu vera nútíðarhóskandi.

Fundurin endaði við, at Steinbjørn Jacobsen takkaði fyri eina serliga siðiliga viðgerð av fíggjarætlanini. Hann heitti á norðoyatingmenninar um at hava eyguni eftir, at nakað hendir viðvíkjandi stuðuli frá landinum til ætlaða vegin undir Kjøli, sum er stungin út í kortið. Hetta við atlitið til væntaða undirsjóvartunnilin.

Eisini kom hann inn á, at sum er, fær Klaksvíkar Havn ongan stuðul frá landinum.

- Tað er púra náturligt, at um aðrar kommunur fáa stuðul til havnaútbyggingar, so eigur Klaksvíkar Kommuna, sum størsta fiskivinnuhavnin í landinum, eisini at fáa stuðul til tílíkar útbyggingar, segði Steinbjørn Jacobsen. Og so var fundur lokin.

Far á flog...



**Frá nú av** og til 9. desember 2002 ber til at ferðast bíliga til Danmarkar og aftur.
Forsølan er til 2. desember 2002. Treytin er at tvey ferðast saman.
Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...

**Føroyar - Keypmannahavn og aftur 1)**
Fyri hvønn
**2165,-**
íroknað ferðaavgjald
Børn 0-1 ár: -90% 0-1 ár við setri: -50% 2-11 ár: -50%

**Føroyar - Billund og aftur 1)**
Fyri hvønn
**2203,-**
íroknað ferðaavgjald
Børn 0-1 ár: -90% 0-1 ár við setri: -50% 2-11 ár: -50%

*1) Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan. Broyting av bílegging kann ikki gerast. Ferðaseðilin kann ikki endurrindast. Ferðatíðarskeiðið skal fara um leygardag og sunnudag. Ferðin kann í mesta lagi vara 1 mánað. Minst tvey skulu ferðast saman, tann eini kann vera eitt barn 2-11 ár. Víðari til Århus ella Odense +200,- t/r.*

MAERSK AIR

petur og petur 320 870